# ÍTRÓTTUR

SAMBAND
JÁKUP MØRK
JAKUP@SOSIALURIN.FO
TLF. 341800

# Føroysk innrás í Bergen

**Um vikuskiftið hevur ein stórur hópur av badmintonungdómum vitjað Bergen í Noregi. Ferðalagið taldi heili 54 leikarar og 12 leiðarar**



*Allur hópurin áðrenn kappingin byrjaði leygardagin*

BADMINTON
*Niels Petersen*
*niels@sosialurin.fo*

Í Bergen hava tey luttikið í stóru opnu kappingini, North Sea Cup, ið badmintonfelagið í Bergen árliga skipar fyri. Í hesi kapping luttaka ungdómar frá feløgum úr Bergen, Stavanger og øðrum býum á norska vesturlandinum.

Badmintonítrótturin í Føroyum hevur veruliga fingið vind í seglini seinastu tíðina við fleiri heiðursmerkjum á oyggjaleikunum í Grønlandi herfyri sum fyribils hæddarpunkt. Góða gongdin heldur fram eisini hjá yngru leikarunum. Í kappingini í Bergen eydnaðist okkara leikarum at vinna heiðursmerkir í fleiri av aldursbólkunum har vit luttóku. Tey ið vunnu gullheiðursmerki vóru hesi:

**U13:**
- *Einmansleikur gentir:* Rannvá D. Carlsson
- *Tvímansleikur gentir:* Rannvá D. Carlsson og Helena Lamhauge
- *Einmansleikur dreingir:* Arnold Kristiansen
- *Tvímansleikur dreingir:* Arnold Kristiansen og Poul Magnus Petersen
- *Blandaður tvímansleikur:* Rói D Olsen og Sunniva F. Berg

**U15:**
- *Einmansleikur dreingir:* Ari Ó Ellingsgaard
- *Tvímansleikur dreingir:* Ellindur Gaard Magnussen og Sverri S. Nielsen
- *Blandaður tvímansleikur:* Ari Ó Ellingsgaard og Birita Poulsen

**U17:**
- *Einmansleikur dreingir:* Fríði Lamhauge
- *Blandaður tvímansleikur:* Brynhild D. Carlsson og Fríði Lamhauge

**U19:**
- *Einmansleikur gentir:* Brynhild D. Carlsson

Umframt øll gullheiðursmerkini, vunnu okkara eisini silvur og bronsu í fleiri aldursbólkum.

Samanumtikið hava vit havt ein frálíkan túr hjá grannum okkara fyri eystan, sum væntandi koma hendavegin at luttaka í Tórshavn Open fyrst í marts mánað komandi ár.



*Tveir glaðir vinnarar (Rannvá og Gunnvá)*



*Frá kappingini (Brynhild og Fríði Lamhauge)*



*Frá kappingini (Kristina og Jákup – Tobias dømir)*